Almanna- og heilsumálaráðið

Dagfesting: 29.12.2025
Mál nr.: 25/13185
Málsviðgjørt:

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum broytt við løgtingslóg nr. 141 frá 11. oktober 2011, løgtingslóg nr. 54 frá 14. mai 2013, løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 46 frá 6. mai 2016, § 23 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 55 frá 29. apríl 2022 og løgtingslóg nr. 65 frá 28. apríl 2025, verða gjørdar hesar broytingar: **1.** Aftan á § 6 a verður sett: "*Berarakanning* **§ 6 b.** Persónar millum 18 og 45 ár og makar hjá berarum kunnu kanna, um tey eru berararar av ílegusjúkum, sum í høvuðsheitum hava hesi eyðkenni: tær kunnu ikki viðgerðast, tær hava í útgangsstøðinum høgan títtleika í Føroyum og tær eru deyðiligar.

	Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann í samráði við Heilsustýrið og Sjúkrahúsverkið áseta reglur um, hvørjar ílegusjúkur tilboðið, sambært stk. 1, fevnir um, at skipa arvafrøðiliga ráðgeving o.t.”
	2. Yvirskriftin yvir § 12 a verður orðað soleiðis: *“Elektroniskar sjúklingajournalir, samskiftishættir o.a.”*
	3. Aftan á § 12 a verður í kapittul 4 a sett: “**§ 12 b.** Landsstýrisfólkið kann í reglum áseta krav um talgilt samskifti í sambandi við tilboðið sambært ásetingini í § 6 b, undir hesum reglur um nýtslu av ávísum kt-skipanum, um undantak í serligum førum til kravið um talgilt samskifti o.ø.”